# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21.01.2025 |
| Mál nr.: | 25/01883 |
| Málsviðgjørt: | JáR, KJ, OYS |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving**
(Løn undir útbúgving og útbúgvingarlongd)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 42 frá 26. apríl 2019 um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námfrøðiliga hjálparaútbúgving, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um útbúgvingarlongdina, harundir býti millum ástøðiliga- og starvsliga partin á heilsurøktaraútbúgvingini."

**2.** Aftan á § 14 verður sum kapittul 3 a sett:

**"Kapittul 3 a**
**Løn undir útbúgving**

**§ 14 a.** Landsstýrisfólkið kann seta skipan í verk um, at arbeiðsgevarar kunnu fáa lønarendurgjald fyri løn til starvsfólk, sum er undir útbúgving á Heilsuskúla Føroya.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um hvør útbúgving í hesi lóg, er fevnd av skipanini um lønarendurgjald.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um lønarendurgjald, herundir um freist at søkja um endurgjald, avmarkingar fyri tíðarskeiði fyri lønarendurgjald, fráboðanarskyldu arbeiðsgevarans og treytir til neyðuga skjalfesting, umsiting v.m.

**§ 14 b**. Útbúgvingarsáttmáli millum starvsfólk og arbeiðsgevara er treyt fyri, at arbeiðsgevari kann søkja um lønarendurgjald.
*Stk. 2.* Landstýrisfólki ásetur nærri reglur um treytir og innihald í útbúgvingarsáttmálanum.
*Stk. 3.* Lønarendurgjald verður bert veitt arbeiðsgevara, sum er góðkent útbúgvingarstað ella sum varðar av góðkendum útbúgvingarstaði, sbrt. § 13.

**§ 14 c**. Lønarendurgjaldið er 60% av minstulønini fyri starvsfólk undir útbúgving sambært galdandi sáttmála á arbeiðsmarknaðinum, frítíðarískoyti íroknað. Endurgjald verður ikki veitt fyri eftirløn og arbeiðsmarknaðargjøld.
*Stk. 1*. Lønarendurgjaldið kann tó ongantíð vera hægri enn 60 % av 60 % av minstulønini fyri útlærd.
*Stk. 2*. Endurgjald verður í mesta lagi veitt fyri tað, ið svarar til skúlaskeiðini, ið eru krav á útbúgvingini og tvey starvsvenjingarskeið.
*Stk. 3*. Endurgjald verður bert veitt fyri starvsvenjingarskeið, um starvsfólk undir útbúgving, av fakligum orsøkum, noyðist at taka partar av starvsvenjingini uttanfyri starvsstað sín."

## § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Stórur tørvur er á, at fáa fleiri at útbúgva seg innan heilsu- og vælferðarøkið. Ein liður í, at fáa fleiri at útbúgva seg, er at gera tað møguligt at taka útbúgvingarnar við løn. Ymiskir møguleikar fyri at veita næmingum á Heilsuskúla Føroya løn hava verið umrøddir og fyrimunir og vansar við ymsu møguleikunum eru lýstir, eitt nú í álitið frá arbeiðsbólki um løn undir útbúgving, ið varð handað landsstýrismanninum í Barna- og útbúgvingarmálum í juni 2024.

Í hesum uppskotinum verður skotið upp, at skipanin verður grundað á lønarafturbering, soleiðis at starvspláss hava møguleika fyri at rinda næmingum løn undir útbúgvingini og fáa part av hesum endurgoldið.

Tørvur er eisini á at tillaga ásetingarnar um útbúgvingartíð og býti millum skúla og starvsvenjing fyri heilsurøktaraútbúgvingina, soleiðis, at hesar ikki longur standa í lógini, men kunnu ásetast í kunngerð.

Orsøkin er, at ynskir eru um, at tað skal vera møguligt at taka heilsurøktaraútbúgvingarnar sum parttíðarlesnað yvir longri tíð, her er serliga talan um heilsurøktaraútbúgvingina.

Umframt, at tað er hugsandi, at tørvur kann vera á at tillaga longdina og býti millum skúlagongd og starvsvenjing í framtíðini, kanska serliga við atliti til løggildingina, sum heilsurøktarar fáa frá donskum myndugleikum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu eru ongar ásetingar um løn undir útbúgving. Talan er sostatt um nýggjar ásetingar.

Útbúgvingartíð og skipanin á útbúgvingunum er ásett í lóg, heldur enn í kunngerð, har hesi viðurskifti lættari kunnu tillagast eftir tørvi – hetta vísir seg at vera sera óheppi, serliga við atliti at krøvum til løggilding.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Skotið verður upp, at tað framyvir fer at bera til hjá arbeiðsgevarum, sum sambært lógini eru góðkent útbúgvingarstað, at veita næmingum á Heilsuskúla Føroya løn undir útbúgving og samstundis fáa ávíst lønarendurgjald fyri útbúgvingartíðarskeiðini, har næmingurin ikki er hjá arbeiðsgevaranum.

Væntandi fer broytingin at hava við sær, at áhugin fyri at taka útbúgvingarnar á Heilsuskúla Føroya fer at vaksa.

Skotið verður upp, at lønarendurgjaldið verður 60 % av minstulønini sambært viðkomandi sáttmála á arbeiðsmarknaðinum. Lønarendurgjaldið verður avmarkað til skúlagongdina og starvsvenjingartíðarskeiðini, har næmingurin av fakligum orsøkum ikki er hjá arbeiðsgevarnum, ið annars eisini veitir góðkenda starvsvenjing í útbúgvingartíðini.

Fyri at tálma, at útreiðslurnar kunnu gerast ov stórar, verður skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimildir til at áseta hvørjar útbúgvingar í lóggávuni talan skal vera um, umframt at landsstýrismaðurin fær møguleika at áseta treytir annars og tíðarfreistir fyri søkja um lønarendurgjald o.a., soleiðis at játtanin til einhvørja kann vera hildin.

Endamálið við at broyta ásetingina um útbúgvingartíð til heilsurøktara er, at geva møguleika fyri at skipa lesnaðin sum parttíðarlesna, umframt at tað gerst smidligari at tillaga útbúgvingina eftir nútíðar krøvum, serliga við atliti til løggilding.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skotið verður upp, at tað framyvir verður møguligt at taka útbúgvingarnar við løn undir skipaðum viðurskiftum. Samstundis verður møguleikin fyri, at taka útbúgvingarnar við lestrarstuðli varðveittir, soleiðis, at tað ber til at tryggja, at fleiri vegir eru ígjøgnum útbúgvingarnar. Her verður eisini hugsað um tey, ið ikki vera fast knýtt at nøkrum arbeiðsgevara undir útbúgvingini ella sum ikki megna at finna eitt starvsvenjingarpláss sjálvi.

Samstundis verður skotið upp, at útbúgvingartíð og samansetingin av skúlatíð og starvsvenjingartíð kann ásetast í kunngerð, soleiðis at tað eisini fer at bera til at taka útbúgvingarnar sum parttíðarlesnað, umframt at tað skal bera til at tillaga útbúgvingarnar eftir tørvi uttan at broyta sjálva lóggávuna – serliga við atliti at løggilding av útbúgvingini.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Verður lagt afturat, tá uppskotið hevur verið til hoyringar

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Skipanin við løn undir útbúgving verður mett at kostað umleið 14 mió. kr. árliga í lønarendurgjaldið, tá ið skipanin er fult rulla út í fíggjarárinum 2027. Skipanin verður galdandi fyri útbúgvingarnar til heilsuhjálpara, heilsurøktara og námsfrøðihjálpara.

Útgangsstøði í kostnaðarmetingini er, at upptøka er tvær ferðir um árið á útbúgvingunum til heilsuhjálpara og heilsurøktara og eina ferð um árið á útbúgvingini til námsfrøðihjálpara. Rokna er við fullum flokkum, tó at flokkarnir, sum verða tiknir upp í dag ikki eru fullir. Tað er ilt at meta neyvt um undirtøkuna, men roknað verður við betri undirtøku fyri útbúgvingunum við nýggju skipanini.

Í kostnaðarmetingini er lønarendurgjaldið roknað útfrá at lønin, sum næmingarnir fáa, verður 60 % av byrjunarlønini hjá einum faklærdum. Í talvuni niðanfyri síggjast byrjunarlønirnar hjá teimum trimum viðkomandi fakbólkunum, og hvat lønin verður hjá einum næmingi, um hann fær 60 % av byrjunarlønini. Ongar ásetingar eru í sáttmálunum um løn til næmingar, og tí er neyðugt at partarnir á arbeiðsmarknaðinum samráðast um lønina, soleiðis at hon kemur inn í viðkomandi sáttmálar.

**Útrokning av lønarendurgjaldinum**

| | Mánaðarløn, byrjanarstig íroknað frítíðarískoyti | Vikuløn byrjanarstig | Næmingur Mánaðarløn | Næmingur vikulig lønarútr. í útbúgvingartíðini | Starvspláss endurgjald pr. mánaða | Starvspláss lønarendurgj. pr. viku |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 60% | | 60% | |
| Heilsuhjálpari | 28.340,19 | 6.540,04 | 17.004 | 3.924 | 10.202 | 2.354 |
| Heilsurøktari | 30.499,11 | 7.038,26 | 18.299 | 4.223 | 10.980 | 2.534 |
| Námsfrøðihjálpari | 28.222,73 | 6.512,94 | 16.934 | 3.908 | 10.160 | 2.345 |

Endurgjaldið frá landskassanum til starvsplássi er sett til 60 % av lønini hjá næminginum íroknað frítíðarískoyti. Í talvuni sæst t.d., at lønarendurgjaldið fyri ein heilsuhjálparanæming tískil er kr. 2.354 um vikuna, meðan vikuliga lønin hjá næminginum er kr. 3.924.

Endurgoldið verður fyri skúlagongdina og partar av starvsvenjingini, og svarar hetta til umleið 70 % av samlaðu útbúgvingartíðini.

Í talvuni niðanfyri sæst, at kostnaðurin í 2025 verður góðar 2 mió. kr., um skipanin verður galdandi fyri heysthálvuna, og tikið verður upp á øllum útbúgvingunum. Á fíggjarlógini fyri 2025 eru 2 mió. kr. játtaðar til endamálið, ið verður mett at verða nøktandi.

Í 2026 verður kostnaðurin slakar 9 mió. kr. og í 2027 góðar 14 mió. kr. tá ið skipanin er rulla fult út. Í dag fáa næmingarnir lestrarstuðul. Studni rindar árliga góðar 4 mió. kr. í lestrarstuðli. Um allir næmingarnir taka útbúgvingina eftir tí nýggju skipanini, verður netto meirkostnaðurin á komandi fíggjarlógum tí umleið 5 mió. kr. í 2026 og 10 mió. kr. í 2027.

**Kostnaðarmeting fyri hvørt fíggjarár**

| | 2025 | 2026 | | 2027 | | 2028 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | aug-25 | jan-26 | aug-26 | jan-27 | aug-27 | jan-28 | aug-28 |
| Heilsuhjálpari, vanlig lestrartíð, kostnaður | 1.000.627 | 765.185 | 117.721 | | | | |
| | | 824.046 | 353.162 | 706.325 | | | |
| | | | 1.000.627 | 765.185 | 117.721 | | |
| | | | | 824.046 | 353.162 | 706.325 | |
| | | | | | 1.000.627 | 765.185 | 117.721 |
| | | | | | | 824.046 | 353.162 |
| | | | | | | | 1.000.627 |
| | | | | | | | |
| **Kostnaður tilsamans** | **1.000.627** | | **3.060.741** | | **3.767.065** | | **3.767.065** |
| | | | | | | | |
| **Heilsurøktari, parttíðarlestur, kostnaður** | 344.593 | 646.112 | 646.112 | 1.076.853 | 473.815 | | |
| | | | | | | | |
| | | | 344.593 | 646.112 | 646.112 | 1.076.853 | 473.815 |
| | | | | | | | |
| | | | | | 344.593 | 646.112 | 646.112 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | 344.593 |
| **Heilsurøktari, vanlig lestrartíð, kostnaður** | | | | | | | |
| | | 387.667 | 818.408 | 1.076.853 | 689.186 | | |
| | | | | | | | |
| | | | | 387.667 | 818.408 | 1.076.853 | 689.186 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | 387.667 | 818.408 |
| | | | | | | | |
| **Kostnaður tilsamans** | **344.593** | | **2.842.892** | | **6.159.599** | | **6.159.599** |
| | | | | | | | |
| **Námsfrøðihjálpari, vanlig lestrartíð, kostnaður** | 820.630 | 937.863 | 1.113.713 | 1.465.411 | | | |
| | | | 820.630 | 937.863 | 1.113.713 | 1.465.411 | |
| | | | | | 820.630 | 937.863 | 1.113.713 |
| | | | | | | | 820.630 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| **Kostnaður tilsamans** | **820.630** | | **2.872.206** | | **4.337.617** | | **4.337.617** |
| | | | | | | | |
| **Kostnaður tilsamans pr. ár fyri alla skipanina** | **2.165.850** | | **8.775.839** | | **14.264.282** | | **14.264.282** |

Í kostnaðarmetingini omanfyri er roknað við fullum flokkum, meðan flokkarnir eftir verandi skipan við lestrarstuðli ikki eru fullir. Høvdu verandi flokkar verið fullir, so høvdu útreiðslurnar til lestrarstuðul verði umleið 11 mió. kr., ið merkir at skipanin við løn undir útbúgving í veruleikanum kostar umleið 3 mió. kr. meira fyri landskassan í lønarendurgjaldið.

Í løtuni tekur Heilsuskúlin bert upp eina ferð um árið á útbúgvingini til heilsurøktara. Upptøka tvær ferðir um árið hevur tí við sær øktar rakstrarútreiðslur fyri Heilsuskúlan, svarandi til útreiðslurnar av einum flokki afturat av heilsurøktaranæmingum. Tørvur er ikki á øktari játtan til raksturin av Heilsuskúlanum í 2025, men í 2026 verður tørvur á at hækkað játtanin til undirvísingina við 1,6 mió. kr. og í 2027 við 0,8 mió. kr. afturat. Heilsuskúlin fær eisini fleiri fyrisitingarliga uppgávur við nýggju skipanini, umframt at møguligur tørvur verður á fleiri hølum til øktu undirvísingina. Til hesar øktu raktrarútreiðslurnar er tørvur á at hækkað játtanina til Heilsuskúlan við 400 tús. kr. í 2026.

Útgjaldið av lønarendurgjaldinum verður ætlandi umsitið av Studna. Hetta verður mett at kostað eitt hálvt ársverk, ið svarar til umleið 250 tús. kr. Nakrar tillagingar skulu eisini gerast í útgjaldingarskipanini, og verða tær mettar at kostað umleið 100 tús. kr.

Í fíggjarlógini er talan um tríggjar kontur, ið verða fíggjarliga ávirkaðar av nýggju skipanini. Í talvuni niðanfyri sæst hvørjar hesar kontur eru, og hvussu stór játtanin skal verða komandi fíggjarárini.

**Samlaði kostnaðurin av løn undir útbúgving**

| | 2025 | 2026 | 2027 |
|---|---|---|---|
| 7.23.7.04-06.<br>Løn undir útbúgving | 2.000.000 | 9.000.000 | 14.000.000 |
| 7.23.3.05-30.<br>Heilsuskúli Føroya | 0 | 2.000.000 | 2.800.000 |
| 7.23.1.02-21<br>Studni | 100.000 | 250.000 | 250.000 |
| Til samans | 2.100.000 | 11.250.000 | 17.050.000 |

## 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Ein møguleiki er, at leggja umsitingina av lønarendurgjaldinum hjá Studna, sum í dag umsitur lestrarstuðul og lestrarlán. Talan verður um økta umsiting, men mett verður ikki, at tað er neyðugt at vaksa um stovnin. Harumframt verður helst neyðugt tøkniliga at menna eina afturberingarskipan ella at tillaga verandi útgjaldsskipan. Roknast kann við, at tilgongdin av næmingum á Heilsuskúlanum fer at vaksa, men at hetta kann gerast við verandi starvsfólkahópi og høliskarmum.

## 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

## 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

## 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

## 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

## 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um.

## 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki ávirkan á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

## 2.9. Markaforðingar

Tað verður ikki mett, at uppskotið elvir til markaforðingar.

## 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Arbeiðsgevari, ið velir at brúka nýggju skipanina um lønarendurgjald, fær við uppskotinum upplýsingarskyldu hvat viðvíkur umstøðunum í sáttmálanum, skyldu at gera sáttmála við viðkomandi starvsfólk og skyldu til, at lata viðkomandi myndugleika útbúgvingarsáttmálan.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
*Íverksetan og val av útbúgvingum*
Lógaruppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at seta skipanina um lønarendurgjald í verk og heimilar landsstýrisfólkinum til at áseta hvørjar av útbúgvingunum í lógaruppskotinum eru fevnd av lønarendurgjaldi.

*Avmarkingar fyri lønarendurgjaldinum og treytir*
Landsstýrisfólkið fær heimild at áseta nærri reglur um lønarendurgjald, herundir um freist at søkja um endurgjald, avmarkingar fyri tíðarskeiði fyri lønarendurgjald, fráboðanarskyldu arbeiðsgevarans og treytir til neyðuga skjalfesting v.m.

*Útbúgvingarsáttmálin*
Landstýrisfólkið fær heimild at áseta nærri reglur um treytir og innihald í útbúgvingarsáttmálanum, sum skal gerast millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ið velja at brúka skipanina.

*Útbúgvingartíð*
Landsstýrisfólkið fær heimild at áseta útbúgvingartíð og býti millum ástøðiliga og starvsliga partin av útbúgvingini til heilsurøktara.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið ikki aðrar avleiðingar

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til § 1, nr. 1**

Ásetingin verður broytt, soleiðis, at útbúgvingarlongdin á heilsurøktaraútbúgvingini í framtíðini skal ásetast í kunngerð.

Hetta kemur av, at talan er um eina løggilda útbúgving, sum til eina og hvørja tíð skal liva upp til krøvini um løggilding sambært donsku autorisatiónslógini (Lovbekendtgørelse 2024-08-29 nr. 1008 om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed). Hetta ger, at tá tillagingar verða gjørdar í donsku útbúgvingini, mugu tillagingar eisini gerast í føroysku útbúgvingini, fyri ikki at missa løggildingina. Tað er Styrelsen for patientsikkerhed, sum umsitur løggildingina.

Útbúgvingarlongdin og býti millum ástøðiliga og starvsvenjingar partin verður tí ásett í kunngerð, soleiðis at útbúgvingin til eina og hvørja tíð kann javnviga við donsku útbúgvingina og harvið varveitað løggildingina.

Ásetingin gevur eisini møguleika fyri at skipa útbúgvingina sum fulltíðar- og parttíðarlesnað.

**Til § 1, nr. 2**

<u>Til § 14 a</u>

Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild at seta skipan í verk um lønarendurgjald á heilsuútbúgvingunum, sum er nevndar í lógini.
Talan er um nýggja skipan, sum skal gera tað møguligt at starvsfólkum á heilsuøkinum at fara undir útbúgving, samstundis sum tey eru í arbeiði á heilsuøkinum.

Skipanin skal minka um fíggjarligu forðingarnar fyri at fara undir eina heilsuútbúgving á Heilsuskúlanum.

Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um hvørjar útbúgvingar eru fevndar av skipanini, freistir fyri at søkja um endurgjald, avmarkingar í tíðarskeiðinum fyri lønarendurgjald, fráboðanarskyldu arbeiðsgevarans, treytir til skjalfesting og annað líknandi, sum er neyðugt fyri at umsita skipanina á skynsaman hátt.

<u>Til § 14 b</u>

Sambært ásetingini er tað ein treyt fyri, at arbeiðsgevari kann fáa lønarendurgjald, at ein útbúgvingarsáttmáli er gjørdur millum arbeiðsgevaran og starvsfólkið, sum fer undir útbúgving á Heilsuskúlanum.

Endamálið við einum tílíkum sáttmála er at tryggja, at bæði arbeiðsgevarin og starvsfólki, sum fer undir útbúgving, hava eina greiða fatan av hvat avtalað verður, samstundis sum sáttmálin kemur at virka sum grundarlag fyri útrokning av lønarendurgjaldi til arbeiðsgevaran.

Nærri reglur um innihald og treytir í útbúgvingarsáttmálanum verður ásett í kunngerð. Arbeitt verður við hvussu ein tílíkur sáttmáli skal orðast. Hetta kann til dømis gerast við íblástri frá lærusáttmálanum, ið verður brúktur á yrkisøkinum.

Harumframt er tað ein treyt fyri at fáa lønarendurgjald, at arbeiðsgevarin er góðkendur sum útbúgvingarstað sambært § 13 í lógini.

Til § 14 c

Ásetingin setur eitt hámark fyri endurgjaldi og avmarkingar fyri hvat endurgjald kann veitast fyri.

Lønarendurgjaldið er sett til at vera 60% av minstulønini fyri starvsfólk undir útbúgving sambært galdandi sáttmála á arbeiðsmarknaðinum. Tó hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki nakra tílíka avtalu í dag, men væntast kann, at tílík avtala verður gjørd, nú skipanin fyri lønarendurgjald verður stovnað.

Eitt mark verður sett á lønarendurgjaldið ið sigur, at útgoldið verður í mesta lagi 60 % av 60 % av minstulønini fyri útlærd. Hetta við atliti til, at skipanin kemur at líkjast lærligaskipanini og at talan í hesum førinum ikki er um serliga endurgjaldsskipan fyri vaksnamannaútbúgving, ið vit kenna frá eitt nú Danmark. Í eini slíkari skipan kundi lønarendurgjaldið møguliga verið hægri.

Harumframt verður ásett, at endurgjald ikki verður veitt fyri teir partar av útbúgvingini, sum kunnu takast hjá arbeiðsgevaranum. Hetta skal skiljast so, at endurgjald bert verður veitt, tá neyðugt at fara út av arbeiðsplássinum, sum starvsfólki er sett á, fyri at uppfylla treytirnar í útbúgvingini. Endurgjald verður í mesta lagi veitt fyri tvey starvsvenjingarskeið, umframt tey skúlaskeiðini, ið eru krav á útbúgvingini.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: